Kunngerð

Fólkatingsvalnevndin fyri Føroyar hevur fingið og góðkent hesar listar til fólkatingsvalið týsdagin 20. november 2001:

Listi A. Hin Føroyski Fólkaflokkurin (Radikalt Sjálvstýri):
Óli Breckmann, fólkatingsmaður, Viðargøta 2, Argir
Bergur Bærendsen, býráðslimur, Tvøroyri
Bjarni Djurholm, landstýrismaður, Millum Gilja 121, Hoyvík
Deirdre Hansen, lærari, Sýnarvegur, Glyvrar
Kjartan I. Joensen, skipari, Leivík
Anfinn Kallsberg, løgmaður, Viðareiði
Jógvan við Keldu, løgtingsmaður, Garðavegur 40, Klaksvík
Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður, Bjarnavegur 10, Fuglafjørður
Leila á Lofti, fysioterapeutur, Traðatún 16, Argir
Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, Sørvágur
Jóanis Nielsen, løgtingsmaður, Sandavágur
Ingi Olsen, bankamaður, Vestmanna
Jákup Olsen, stjóri, Vágur
Rúna Sivertsen, løgtingskvinna, Skáltavegur 22, Klaksvík
Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmaður, Skákið 9, Tórshavn
Ingimar Tór Thomsen, skipsførari, Skopun
Eyðun Viderø, løgtingsmaður, Sandur

Listi B, Sambandsflokkurin:
Annfinn Brekkstein, borgarstjóri, á Stórheyggi, Velbastaður
Johan Dahl, stjóri, Porkeri
Marjus Dam, løgtingsmaður, Miðvágur
Súsanna Dam, bankakvinna, Purkugerði 3A, Tórshavn
Terje Davidsen, tannlækni, Kollafjørður
Olav Enomoto, datamatikari, Gr. Kambansgøta 18, Tórshavn
Finnleif Guttesen, borgarstjóri, á Torvheyggi, Tvøroyri
Atli Hansen, stjóri, Norðagøta
Maria Hansen, sjúkrasystur, Vestmanna
Edva Jacobsen, bankakvinna, Norður í Gerði 37, Fuglafjørður
Eivind Jacobsen, borgarstjóri, Strendur
Sune Jacobsen, lærair, Sørvágur
Alex Jespersen, lærari, Sandur
Edmund Joensen, løgtingsmaður, Oyrabakki
Betta Joensen, lærari, Rættargøta 2, Klaksvík
Jákup Joensen, stjóri, Lopra
Jóhan Petur Johannesen, lærari, á Frælsinum 24, Tórshavn
Kaj Leo Johannesen, stjóri, á Teigi 6, Tórshavn
Jákup Lamhauge, havnameistari, Sornhúsgøta, Saltangará
Gunnar Nattestad, fulltrú, Sandavágur
Bárður Nielsen, á Válinum, Vestmanna
Alfred Olsen, løgtingsmaður, Saltnes
Marjun Olsen, sjúkrahjálpari, Øravíkarlíð
Joen Peter Petersen, kokkur, Skálavík
Lisbeth L. Petersen, løgtingskvinna, Handaratún 9, Tórshavn
Birgir Thomsen, sjómaður, Skúvoy

Listi C. Javnaðarflokkurin:
Thomas Arabo, verkfrøðingur, Signabøur
Jóannes Eidesgaard, fólkatingsmaður, Tvøroyri
Malan Helgadóttir, bygdaráðslimur, Miðvágur
Sylverius Jacobsen, smiðjumeistari, Skáli
Katrin Dahgl Jakobsen, løgtingskvinna, Villingardalsvegur 61, Tórshavn
Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, Líggjasarbrekka 61, Klaksvík
Hans Jørgensen, skrivari, Miðvágur
Elin Lindenskov, býráðslimur, Frúutrød 14, Tórshavn
Gerhard Lognberg, borgarstjóri, Skopun
Kristian Magnussen, løgtingsmaður, Dungagøta 13, Tórshavn
Jákup Birgir Mohr, sýslufulltrúi, Sandur
Gunnvá Mortensen, skrivari, Hósvík
Rasmus Niclasen, netumsitari, Sørvágur
Henrik J. F. Old, løgtingsmaður, Vágur
Andreas Petersen lækni, Syðrugøta
Dan Reinert Petersen, løgtingsmaður, Fuglafjørður
Bartal Nolsøe Poulsen, hjálparfólk, Áarvegur 14, Tórshavn
Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur, Jørundsgøta 40, Klaksvík
Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður, Vestmanna

Listi D. Sjálvstýrisflokkurin:
Eyðun Eltør, landsstýrismaður, í Búðinum, Klaksvík
Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, Søldafjørður
Hans J. Hermansen, koyrilærari, Tórsbyrgi 16, Tórshavn

Listi E. Tjóðveldisflokkurin:
Jógvan Arge, býráðslimur, Tjarnardeild 12, tórshavn
Olga Biskopstø, samfelagsfrøðingur, Garðavegur 4, Klaksvík
Signar á Brúnni, løgtingsmaður, Fuglafjørður
Jógvan Durhuus, løgtingsmaður, Vestmanna
Andrea Eldevig, lesandi, Vestur í Bø 2, Fuglafjørður
Jóannes Eliasen, evnafrøðingur, Leirvík
Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna, Jørundargøta 53, Hoyvík
Karsten Hansen, landsstýrismaður, Heygavegur 67, Klaksvík
Kristina Háfoss, búskaparfrøðingur, Marinargøta 2, Hoyvík
Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, Kunoy
Høgni Hoydal, landsstýrismaður, Millum Gilja 87, Hoyvík
Árni Jacobsen, lærari, Miðvágur
Tórbjørn Jacobsen, skipari, Glyvrar
Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, Vágur
Rani Nolsøe, havnarmeistari, Klaksvíksvegur 52, Klaksvík
Niklái Petersen, skipsførari, Todnes, Kollafjørður
Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður, Sandur
Turið Sigurðardóttur, bókmentafrøðingur, Leivsgøta 4, Tórshavn
Sjúrður Skaale, tíðindamaður, Rektorparken 14, 3th, København SV
Zakarias Wang, lærari, Hornavegur 16, Hoyvík

Listi H. Miðflokkurin:
Svein Askildsen, marknaðarleiðari, Gæsugøta 14, Tórshavn
Anna Dam, húsmóður, Porkeri
Bill Justinussen, skrivstovumaður, Dalavegur, Glyvrar
Álvur Kirke, goymslumaður, Kaldbak
Bjørg av Rana Nietschke, ljósmóðir, Trongisvágur
Tordur J. Niclasen, fyristøðumaður, Eiði
Jenis av Rana, lækni, Sóljugøta 10, Tórshavn

Tórshavn, tann 11. november 2001

V.v.
Olaf á Stongunum, fm.

Sosialurin Lesið Sosialin -tað loysir seg!

Kunngerð

Til veljarar til fólkatingsvalið 20. november 2001 í Klaksvíkar kommunu:

Atkvøðugreiðslan fer fram **týsdagin 20. november 2001** á hesum støðum:

- fyri bygdirnar í Klaksvík, Norðoyri og Ánir: **í Ítróttarhøllini í Klaksvík**
- fyri bygdina Árnafjørð: **í skúlanum í Árnafirði**

Atkvøðutíðin er millum kl. 09.00 og kl. 20.00 og heldur fram, so leingi veljarar møta uttan steðg.

Veljarar, ið sambært vallógina hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á fólkayvirlitinum á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð. Tey, sum vegna sjúku ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima við at venda sær til býráðsskrivstovuna **tlf. 456388 innan kl. 15.00.**

Harumframt verður býráðsskrivstovan opin til avgreiðslu av brævatkvøðu, **leygardagin 17. november frá kl 14:00 - 18:00.**

Klaksvíkar býráð
12. november 2001

Kunngerð

Gjørt verður kunnugt, at valkort til nýtslu til fólkatingsvalið í Klaksvíkar kommunu týsdagin 20. november 2001 eru send øllum veljarunum, ið standa á vallistanum.

Veljari, ið ikki fær valkort ella fær valkort við villum í, biðist venda sær til býráðsskrivstovuna tlf. 456388.

Klaksvíkar býráð
12. november 2001

Stuðlafelagið Glottin

hevur aðalfund í Pállsstovu mikukvøldið 14. november kl. 18.30.

Aftaná verður bingo, 15 ókeypis plátur. Bert limir, sum hava goldið limagjald fyri 2001, hava atgongd. Burturlutað verða 10 lutir millum limirnar.

Á lutaseðlunum verða 20 vinningar m.a. karamellir, føroyskar dunnur, gæs, ræst kjøt og gávukort.

Stuðlafelagið Glottin

Maskinførari

Søkt verður eftir maskinførara. Stóra koyrikortið er ein fyrimunur.

Sp/f í Djúpagili
tlf. 215921 aftaná kl. 19.00

Kunngerð

um fólkatingsval í Fuglafjarðar kommunu.

Til veljarar til fólkatingsvalið 20. november 2001 í Fuglafjarðar kommunu.

Vísandi til kap. 6, § 24, stk. 2 í »Lov om folketingsvalg på Færøerne nr. 458 af 30. juni 1993«, so skal hervið verða kunngjørt, at atkvøðugreiðslan fer fram í býráðssalinum týsdagin tann 20. november 2001 fyri bygdirnar Fuglafjørður og Kambsdalur og í sethúsunum hjá Annu Jensen fyri Hellurnar.

Atkvøtt verður millum kl. 09.00 og 20.00 og heldur fram, so leingi veljarar møta uttan støðg.

Veljarar, ið sambært vallógini hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð mánadag til fríggjadag millum kl. 10.00 og 15.00 og leygardagin tann 17. november millum kl. 10.00 og 14.00, sum er seinasti rættstundis dagur fyri brævatkvøðugreiðslu.

Tey, sum vegna sjúku ikki kunnu koma á valstøðini, kunnu velja heima við at venda sær til býráðsskrivstovuna telefon 444006 í seinasta lagi mánadagin tann 15. november 2001 kl. 15.00.

Valkort skulu verða nýtt við valavgreiðsluna, og eru hesi send veljarunum út við postinum. Veljari, sum ikki fær valkort ella sum fær valkort við villum í, eigur at venda sær til býráðsskrivstovuna skjótast gjørligt.

Fuglafjørður, tann 13. november 2001
Fuglafjarðar býráð

Fólkatingsvalið 20. nov. 2001

Til veljarar í Sjóvar kommunu. Valið fer fram á hesum støðum:

í bygdarhúsinum á Strondum (stóra sali)
og í skúlanum á Selatrað frá kl. 09.00-20.00.

Valkort eru send veljarunum. Veljari, ið ikki hevur fingið valkort, eigur at seta seg í samband við kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt.

Sambært fólkatingsvallógini er seinasta freist at greiða brævatkvøðu, til fólkatingsvalið, leygardagin 17. nov.

Í hesum sambandi er kommunuskrivstovan opin leygardagin 17. nov. frá kl. 10.00-12.00.

Tey, ið ikki eru før fyri at koma á valstaðið, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 447158 innan kl. 12.00 leygardagin 17. nov.

Minnist til at hava valkortið við á val.

Strendur 12.11.01.
Sjóvar kommuna

Fólkatingsvalið

Valkort
Til fólkatingsvalið, sum verður 20. november 2001, verða valkort send veljarum í kommununi.

Um onkur, sum heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal viðkomandi siga frá hesum á kommunuskrivstovuni í seinasta lagi 15. november 2001, kl. 18.00.

Brævatkvøður
Veljarar í Hvalbiar sóknar kommunu, sum sambært vallógini lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni til og við 17. november 2001, kl. 15.00.

Veljarar í Hvalba og Sandvík, ið vegna sjúku ikki eru førir fyir at koma á valstøðini, og sum ynskja at greiða brævatkvøðu heima, kunnu boða frá hesum við at ringja í Hvalba tlf. 375206 og í Sandvík tlf. 375231 í seinasta lagi 16. november 2001, kl. 15.00.

Valið
Í Hvalba verður valt í skúlanum á Vilsnabrúgv
Í Sandvík verður valt í skúlanum týsdagin 20. november 2001.

Atkvøðugreiðslan fer fram frá kl. 09.00 til kl. 20.00 ella til støðgur kemur í eftir kl. 20.00.

Hvalbiar Sóknar Kommuna

Mentamálastýrið
Mentamáladeildin

Endurlýsing

Studningur til myndlistafólk

Á fíggjarløgtingslógini 2001 eru kr. 40.000 játtaðar til studning til myndlistafólk, sum sýnt hava góðar gávur.

Tey, ið ætla sær ella eru farin uttanlands at búgva seg út í málara, myndhøggara- ella aðrari myndlist, eru vælkomin at søkja.

Við umsóknini eiga at verða allir viðkomandi upplýsingar um útbúgvingina, sum peningurin ætlandi skal nýtast til og um útbúgving áður.

Allar umsóknir eiga at verða skrivaðar á serstakt umsóknarblað til endamálið. Umsóknarbløð og vegleiðingar eru at finna á internetinum á: www.mms.fo ella fáast við at venda sær til:

Mentamálastýrið
Postrúm 3279 - 110 Tórshavn
Telefon 35 50 50 - Telefax 35 50 55
e-postur: mms@mms.fo

Umsóknirnar skulu verða Mentamálastýrinum í hendi innan hósdagin **29. november 2001.** Tey, ið ynskja at vita meira um stuðulin, eru vælkomin at venda sær til Mentamálastýrið á telefon 355050.